umhvørvisstovan

# Áheitan, boð ella forboð

**Henda vegleiðing greiðir frá hvussu kommunur skulu bera seg at tá áheitanir, boð ella forboð skulu gevast borganum ella virkjum um at fáa viðurskifti innan umhvørvisøki í rættlag.**

Tá ein umhvørvismyndugleiki verður varur við dálking ella annað, er vanligt, at myndugleikin, t.e. kommunan ella Umhvørvisstovan, fyrst heitir á viðkomandi virki ella borgara um at fáa viðurskiftini í rættlag. Ein áheitan kann vera bæði munnlig ella skrivlig, og kann gerast sum ein avtala millum eftirlitsmyndugleika og virki ella borgara um at fáa ávís viðurskifti í rættlag innan ávísa freist.

## Bara eina áheitan

Viðurskifti, ið ikki eru í trá við lóggávu ella reglur, eiga bara at verða átalað eina ferð. Fleiri áheitanir um somu viðurskifti, kann gera støðu eftirlitsmyndugleikans veikari í sambandi við eitt møguligt rættarmál. Hetta tí, at tað kann tulkast sum vantandi fastleiki hjá myndugleikanum ella at talan er um viðurskifti, sum ikki hava serligan týdning.

## Ampar torførir at staðfesta

Ofta er torført at staðfesta um talan er um ólóglig viðurskifti ella viðurskifti, sum eru til ampa fyri borgarar. Í slíkum førum eigur myndugleikin, áðrenn boð ella forboð verða givin ella málið verður latið løgregluni, at kanna málið gjølla.

## Boð

Greið og álvarslig lógarbrot eiga altíð at føra til, at myndugleikin beinan vegin gevur boð um at fáa viðurskiftini í rættlag. Talan kann eisini vera um forboð fyri tí dálkandi virkseminum.

Í serligum førum kann myndugleikin beinan vegin sjálvur seta tiltøk í verk fyri at støðga dálkingini. Tað kann t.d. vera í sambandi við eina álvarsliga dálking.

Er talan um brot, sum eru framd við vilja ella av grovum ósketni, eigur málið eisini at verða latið løgregluni. Eini boð skulu altíð grundgevast og víst skal vera til, við hvørji heimild boðini verða givin.

Boð skulu vera skrivlig.

Um talan er um vanda fyri heilsu ella álvarsligan skaða á umhvørvið, kann vera neyðugt við tiltøkum alt fyri eitt. Tá kunnu boð gevast munnliga. Eini munnlig boð skulu tá eisini skjótast gjørligt gevast skrivliga.

Í slíkum førum fellur bæði skyldan til ætlanarskriv og at geva eina freist burtur. Heldur ikki fær ein kæra uppsetandi virknað, t.e. boðini standa við hóast tey verða kærd.

## Partshoyring og kæruvegleiðing

Sambært bæði umhvørvisverndarlógini og fyrisitingarlógini er høvuðsreglan, at allar avgerðir, sum ein



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

myndugleiki tekur, t.d. eini boð ella forboð, skulu grundgevast, at gevast skal ein freist at fáa viðurskiftini í rættlag, og at tann, sum avgerðin rakar, skal hava kæruvegleiðing.

Tó kunnu ikki allar avgerðir kærast.

Er talan um eina sokallaða staðfestandi avgerð, t.e. boð um at fylgja lóg, kunngerð ella t.d. eini treyt í loyvi ella góðkenning, kunnu boðini ikki kærast. Tað ber ikki til at fáa viðhald í einum máli, har talan er um greitt brot á lóggávuna. Her er tó umráðandi, at myndugleikin kannar málið gjølla fyri at staðfesta, at talan veruliga er um brot á lóggávu ella reglur. Er hin vegin talan eina sokallaða stovnandi avgerð, t.e. um viðurskifti, sum annars eru lóglig, men har virksemið t.d. elvir til dálking ella er til ampa fyri grannar, skal tann, sum boðini fær, hava møguleika fyri partshoyring og møguleika at kæra avgerðina.

Í ávísum førum stendur beinleiðis í lóggávuni, at ein avgerð ikki kann kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Slíkar avgerðir kunnu sjálvandi ikki kærast.

## Ætlanarskriv

Áðrenn boð verða givin um eina stovnandi avgerð, skal ætlanarskriv sendast, har greitt verður frá, at myndugleikin ætlar at geva boð ella forboð. Ætlanarskrivið skal innihalda upplýsingar um viðurskiftini, hvørja avgerð myndugleikin ætlar at taka og við hvørji heimild avgerðin verður tikin.

Eisini skal í einum ætlanarskrivi verða greitt frá, at viðkomandi hevur rætt til partshoyring. Myndugleikin skal biðja viðkomandi virki ella borgara um at veita upplýsingar um kostnað, fyrimunir og vansar, ið kunnu standast av avgerðini. Eisini skal gevast ein freist fyri at koma við viðmerkingum.

Harumframt skal verða upplýst, at viðkomandi hevur rætt til innlit í málið.

## Dømi um skriv

Umhvørvisstovan hevur gjørt nøkur dømi um skriv, ið kommunur kunnu senda borgarum.

Dømini eru fylgjandi, og kunna síggjast á www.us.fo/Default.aspx?ID=11491

- **Ætlanarskriv og skriv við boðum í sambandi við brenning**
  (boð um at gevast við lógligum viðurskiftum – tí ætlanarskriv og kæruvegleiðing)
- **Ætlanarskriv og skriv við boðum um at taka hús niður**
  (hús eru ikki ólóglig – tí ætlanarskriv og kæruvegleiðing)
- **Ætlanarskriv og skriv við boðum um at burturbeina bilvrak og órudd**
  (tað er ikki altíð greitt hvat órudd og bilvrak er - tí ætlanarskriv og kæruvegleiðing)
- **Skriv við boðum um at burturbeina deyða kúgv**
  (eingin ivi um, at talan er um ólóglig viðurskifti – tí hvørki ætlanarskriv ella kæruvegleiðing)
- **Skriv við boðum um at gevast við at leiða tøð út í á**
  (ólóglig viðurskifti – tí eingin kæruvegleiðing)

Fyrstu ferð útgivin: 09.07.2010
Seintast dagført: 09.07. 2010
Útgava nr.: 1



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo